**Almenni bygdaráðsfundurin 04.12.2006**

**Mál nr. 80/2006 Kommunumál.**
**Kommunusamanlegging.**
**Frágreiðing:** Skriv er komið frá Innlendismálaráðnum til hoyringar um "Uppskot til Løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar"
Og skal kommunan koma við møguligum viðmerkingum.

**Avgerð:** Bygdaráðið samtykti at taka undir við uppskotinum um at Eysturoy verður ein kommuna, men har tað er gjørligt, og ávísast kunnu fyrimunir, skal verða møguleiki at kunna samstarva við onnur økir.
Hetta eigur at vera galdandi fyri allar kommunur og innan øll økir í Føroyum.

**Mál nr. 81/2006 Fíggjarmál**
**Høganesætlanin.**
**Frágreiðing:** Hin 13.11.2006 kom skriv frá Sp/f Munin við tilboð uppá uppmáting av Etapu 1 Høganes-Løkin.Tilboðið er áljóðandi kr. 46.800,00 - 3D- model er ikki íroknað

Fíggjarnevndin mælir til at játta 46.800,00 til projektarbeiðið í ár, og at fíggja hetta av meirinntøkuni hjá kommununi fyri 2006.
Sostatt er játtanin íalt fyri 1. etapu kr. 259.200

**Avgerð:** Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 82/2006 Fíggjarmál**
**Stuðul til Ungdómsarbeiðið.**
**Frágreiðing:** Hin 20.11.06 søkir Tofta Ítróttarfelag um stuðul til rakstur av ungdómsdeildini.
Felagið hevur sett nýggjan høvuðsvenjara fyri ungdómsdeildina fram til 2008.
Stuðulin frá Nes kommunu er í ár 300.000,00 kr. svarandi til 25.000,00 um mánaðin. Av hesum fara 13.000,00 kr. til afturgjaldan av lánið hjá felagnum og 12.000,00 kr. sum beinleiðis stuðul.

Fíggjarnevndin mælir til at hækka verandi játtan sum er 300.000 kr. við 50% t.v.s. upp til kr. 450.000
Fíggjarnevndin mælir til, at kommunan treytar sær, at meirjáttanin fer beinleiðis til ungdómsarbeiðið hjá felagnum.

**Avgerð:**Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 83/2006 Skúlamál**
**Føroyskur Eftirskúli.**
**Frágreiðing:** Skriv er komið frá nevndini fyri føroyskum eftirskúla v/Ólavi Rasmussen, Hvalba.
Nevndin, sum við heimild frá Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, hevur gjørt fyrireikingararbeiðið um føroyskan eftirskúla, handaði tann 28. septembur 2006 landstýrismanninum í mentamálum álit, har grein verður gjørt fyri kostnaði, skitsum og staðseting.
Álitið skal samstundis skiljast sum ein umsókn um stovnsetan av eftirskúla og áheitan á landstýrið um at koma á fíggjarlógina fyri 2007.
Nevndin hevur mælt landstýrinum til, at eftirskúlin kemur á komandi fíggjarlóg við 7,5 milliónum krónum, so farast kann undir projektering og útgrevstur í flotanum í Hvalba.
Eftirskúlin er mettur at kosta í alt áleið 90 milliónur krónur, býtt helvt um helvt millum land og kommunur. Talan er um ein kostskúla við íbúðum til 80 næmingar. Ætlanin er, at eftirskúlin er klárur at taka í nýtslu til skúlaárið 2009.
Nevndin heitir á kommunur um at taka støðu til tann fíggjarliga partin av eftirskúlanum fyri 2007. Talan er um 7,5 milliónur kr., býttar millum kommunurnar proportionalt við fólkatalið 1. oktobur 2005.
Fyri Nes kommunu er talan um áleið kr. 191.000,00 fyri 2007 og kr. 954.000,00 fyri 2008 og 2009 ella íalt kr. 1.145.000,00.
Møguleiki er hjá kommununum at spjaða kostnaðin yvir eitt longri áramál, so bitin ikki verður ov stórur at gloypa.

Mentanarnevndin metir, at tíðspunkti til slíka skúlaætlan (bæði tá talan er um bygging og stovnsetan av eftirskúla) ikki er tað rætta, men at kommunan og landi eiga at brúka orku til at fáa verandi fólka-skúlan upp á eitt rímuligt støðið sum í hinum norðanlondum (serliga eftir pisa kanningina), og tí mælir mentanarnevndin frá at taka undir við hesum uppskotinum.

Fíggjarnevndin metir, at hugskotið við eftirskúlanum er gott, og at tað eigur at arbeiðast víðari við projektinum, men metir eins og Mentanarnevndin, at tíðspunktið nú ikki er tað rætta, og somuleiðis mælir Fíggjarnevndin til, at kommunan bíðar eftir útmeldingini frá landinum til hesa skúlabygging. Annars tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð:**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 84/2006 Mentanar-Fíggjarmál**
**Umsøkn um stuðul.**
**Frágreiðing:**Hin 10.11.2006 kom umsókn um stuðul til fløguútgávur frá Jens L. Thomsen.
Fíggjarætlanin fyri fløguútgávuna er áljóðandi kr. 210.000,00.
Fløguútgávan er við tónleiki spældur á ljóðføri, sum eru gjørd burtur úr burturkasti og óruddi í einum fjósi innan Glyvur. Ljóðførinum vóru t.d. burtur úr pelum, blásipistólum, einum sementblandara og øðrum tilfari.

Konsert var hildin í fjósinum við ymisku ljóførunum alt meðan fuglar, neyt, vindur og regn sungu við.

Mentanarnevndin heldur hesa fløguna at vera sermerkta, men mælir bygdaráðnum frá at játta pening til fløguútgávuna hjá Jens L. Thomsen.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 85/2006 Mentamál/fíggjarmál**
**Musikkskúlin.**
**Frágreiðing:**Samtykt var í nevndini fyri Nes Sóknar Musikskúla hin 7. novembur 2005 at skúlin skuldi hava so gott útboð bæði av ljóðførum og lærarum sum gjørligt. Lærara lønin var hækkað, so hetta gav ein meirkostnað fyri Nes kommunu áljóðandi kr. 33.000,00.
Avsett var kr. 100.000,00 og fekk ikki við í ætlanini fyri 2006 tær 33.000,00 aftrat.
Sostatt er neyðugt at fáa eina eykajáttan áljóðandi kr. 33.000,00 fyri 2006 uppá pláss áðrenn ársskifti.

Mentanarnevndin mælir bygdaránum til at játta Musikkskúlanum hesa eykajáttan uppá 33.000,00 kr. á fíggjarætlanini fyri 2006.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og hækka kto. nr. 410400 "Musikkskúlin" og at taka peningin av meirinntøku 2006.

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 86/2006 Mentamál/fíggjarmál**
**Musikkskúlin.**
**Frágreiðing:**Á fundi 14.11.2006 samtykti nevndin fyri Nes Sóknar Musikskúla, at leiðararnir skuldu fáa 6,5 % av lønunum hjá lærarunum, og at hetta skuldi koma í gildi 01.08.2006.
Hetta førir ein meirkostnað við sær uppá kr. 7.358,18 fyri 2006

Mentanarnevndin mælir til at játta leiðarunum fyri Musikkskúlan í alt kr. 7.358,18 fyri 2006.

Fíggjarnevndin biður um eina útgreinan av hesum útreiðslum frá limunum hjá Nes kommunu í Musikkskúlanevndini, til bygdaráðsfundin, áðrenn støða verður tikin til hesa meirjáttan.

**Avgerð:**Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2006 Mentamál**

Hin 09.11.2006 kom skriv frá Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum saman við einum bóklingi "Skráin, yvirlit og vegleiðandi um atkomu".
Teirra vón við hesum tiltakinum er, at borgarstjórar vilja ganga á odda í kommununi, so at atkoma fyri fólk við breki altíð verða sett í hásætið, til gagns fyri allar borgarar í kommununi.
Viløgd er ein vegleiðing frá MBF um hvørji atlit skulu takast, tá bygt verður. Henda vegleiðing inniheldur nøkur minsta krøv til bygging fyri fólk við breki.
Tey vóna, at kommunurnar vilja taka hesa vegleiðing til sín, sum minsta krav tá bygt verður. Hetta meta tey er neyðugt í tíðarskeiðinum, meðan Lands Byggireglugerð verður gjørd.

Mentanarnevndin mælir til, at kommunan tekur hetta til eftirtektar.

**Avgerð:**Tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.

**Mál nr. 88/2006 Mentamál**
**Umhvørvisskúlar í Føroyum.**
**Frágreiðing:**Hugtakið "Umhvørvisskúlar" ella "Grønur skúli" hevur verið ein partur av gerandisdegnum í fólkaskúlanum í okkara grannalondum í nøkur ár. Aftan fyri hugtakið liggur eitt ynski at læra okkara børn um náttúruna og umhvørvið, samstundis sum raksturin av skúlunum kann gerast meira umhvørvisvinarligur.
Fyri stuttum kom út tilfar til umhvørvisundirvísing á føroyskum. Talan er um tilfarið "Rusk í skúlanum", sum var lagt fram á Landsmiðstøðini í síðstu viku. Tilfarið, sum er eitt undirvísingarhefti og ein læraravegleiðing, fæst ókeypis við at venda sær til Landsmiðstøðina.

Mentanarnevndin mælir til, at kommunan altíð hevur nokk av ruskíløtum sum standa runt í bygdini. Tað skal áliggja kommunumonnunum at tøma hesi hvønn fríggjadag og sama dag taka rusk upp fram við lands- og bygdavegnum.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður brúktur av renovationskontoni.

**Avgerð:**Tilmælini samtykt.

**Mál nr. 89/2006 byggimál**
**Innilokan av basengi.**
**Frágreiðing:**Hin 16.11.2006 søkir Jógvan I. Olsen um byggiloyvi til at inniloka eitt baseng, sum stendur á matr. nr. 698a til seyðhus, og sum ikki er í brúki meira, men sum bæði húsini á Gørðum hava verið saman um. Teir báðir eigararnir hava játtað nevnda byggimál.

Ætlanin er at mála húsið svart leggja flagtekju á og mála vindeyguni hvít. Um so er at økið skal brúkast til annað, verður húsið niðurtikið uttan kostna fyri nakran annan.

Tekniska nevnd mælir til at játta loyvi eftir vanligum treytum.

**Avgerð:** Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 90/2006 Byggimál**
**Gerð av tilbygningi.**
**Frágreiðing:**Hin 07.11.2006 søkir Sámal Petur Olsen um loyvi til at gera ein dur framman fyri úthurðina til íbúðina í kjallaranum.

Tekning dagf. 06.11.2006 er viðløgd og vísur, at ætlanin er at byggja ein uppíbygning sum er 160 cm. breiður og 360 cm oman og niðan, við eini hædd inn móti húsinum uppá 270 cm og suðuri á garðinum 230 cm, so hallið á takinum er suðureftir..

Tekniska nevnd mælir til at játta byggiloyvi til durin, eftir vanligum treytum.

**Avgerð:**Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 91/2006 jarðarmál**
**Keyp av lendi.**
**Frágreiðing:**Hin 21.11 kom umsókn um uppískoytisstykki frá Johan Brian Johannesen til ummælis hjá kommununi.
Søkt verður um at fáa uppískoytisstykki burtur av leigutrøðni matr. nr. 329 John Højgaard, Toftir at leggja aftrat matr. 334.

Tekniska nevnd mælir til at ganga umsóknini á møti, men áðrenn hetta verður gjørt og umsóknin verður svara, verður umsóknin, samb. góðum fyrisitingarreglum send til grannan John Højgaard til hoyringar og við spurninginum, um hann kann viðmæla hesum uppískoytisstykki.

**Avgerð:** Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 92/2006 Skúlamál / fíggjarætlan 2007**
**EDV útgerð.**
**Frágreiðing:**Í samband við viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2007 er umsókn komin frá skúlanum um eykaútgerð til næmingar við serligum tørvi. Talan er serliga um keyp av EDV-útgerð v.m. kostnaður er kr. 27.300,00
Skúlastýrið mælir til at kommunan játtar pening til endamálið.
Málið hevur ikki verið til viðgerðar í mentunarnevndini.

Fíggjarnevndin mælir til at avseta hesa upphædd á kto. nr. 400350 "Undirvísingaramboð/Telduútgerð".

**Avgerð:** Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 93/2006 Fíggjarætlan fyri 2007.**

Fíggjarætlanin fyri 2007 fekk 2 og endaligu viðgerð, har bygdaráðið gjøgnumgekk allar konto frá skattskyldugu inntøku til og við íløgurnar.
Samtykt var:

| | |
|---|---|
| Skattaprosenti | 20,5 |
| Barnafrádrátturin | 4.500,00 kr. |
| Mettar inntøkur | 30,5 mió. Kr. |
| Lántøka | 15,9 mió. Kr. |
| Nýtsla av tøkum peningi | 1,2 mió. Kr. |

| | |
|---|---|
| Fíggjarætlanin javnvigar | 47,6 mió. Kr. |
| Av hesum er rakstur | 23,3 mió. Kr. |
| Íløgur | 24,3 mió. Kr. |

Íløgurnar eru til skúlabygging, havnagerð, ídnaðarøki og útstykkingar.

Tølini vóru lisin upp á almenna fundinum.